




**Jóannis Petersen** er lærari, kirkjurráðslimur og deknur við Bíggjar kirkju, ið er tann elsta í Vágum

***Nógvar kirkjur hava ilt við at fáa organistar. Hvussu er hjá tykkum í Bø?***

- Hóast bygdin er lítil, er gudstænasta hvønn sunnudag, og vit eru heldur ikki undirmannað við kirkjutænarum. Vit eru tveir deknar sum skiftast, og vit hava fastan organist, so tað stendur bara væl til.

***Í hvørjum standi er kirkjan?***

- Kirkjan er pen, bæði uttan og innan, og er opin og tykist passalig í støddd. Hon hevur fingið ymsar umvælingar og er í góðum standi. Vit fingu nýtt orgul í 1991, og tað er gott til okkara brúk.

***Hvussu nógv fólk koma til gudstænasturnar?***

– Millum 5 og 10. Tað er sjálvandi ikki nógv, og tí merkist tað beinan vegin, um onkur er farin av bygd eitt vikuskifti. Vit fegnast tó um, at tað eru kjarnukirkjugangarar, sum gera tað gjørligt at hava gudstænastu hvønn sunnudag.

***Hvussu sær út í framtíðini?***

– Tað eru fleiri føroyskar familjur, sum hava tilknýti til bygdina, sum koma higar um summarið. Tað merkist sjálvandi væl til gudstænasturnar, tá ið vit fáa gestir. Tað fegnast vit um.

- Bø er ein bygd í vøkstri. Tað verða hús bygd, og tað eru nógvar barnafamiljur í bygdini. So framtíðin sær bjørt út fyri bygdina og kirkjuna.

(Kelda: folkakirkjan.fo)



# Øskuskýggj vendi avlopi til hall

**ATLANTSFLOG** Úrslitið hjá Atlantic Airways annan ársfjórðing í 2010 var eftir skatt eitt hall á 1,5 milliónir krónur

Eirikur Lindenskov

- Úrslitið hevði verið eitt avlop, um øskuskýggið úr Íslandi ikki legði flogferðsluna lamna í apríl og mai, tí felagið hevði fimm milliónir krónur í eykaútreiðslum orsakað av øksuskýnum, sigur felagið í tíðindaskrivi.

Úrslitið hjá Atlantic Airways fyrra hálvár í 2010 var eftir skatt eitt hall á 7,1 milliónir krónur. Umfamt øskuskýggið hevði felagið avbjóðingar orsakað av minkandi virksemi, vaksandi oljuprísum og hækkaðum avgjøldum. Felagið sigur, at útlit eru tó til, at triði ársfjórðingur fer at roynast væl, og at ársúrslitið verður betri enn í fjør.

- Øskuskýggið var ein smeitur fyri okkum annan ársfjórðing, og tað ávirkar úrslitið. Felagið hevur tó góðar vónir um at fáa eitt betri úrslit triðja ársfjórðing í ár. Tá er ferðslan mest, og virksemið í oljuvinnuni er eisini økt, sigur Magni Arge, stjóri í Atlantic Airways.

Atlantic Airways hevur síðan búskaparkreppan tók seg upp sett fleiri tiltøk í verk at minka um kapasitetin og framleiðslukostnaðin fyri at laga virksemið til broyttu umstøðurnar. Hesi tiltøk bera nú ávøkst.

- Framdu tiltøkini at tillaga virksemið síggjast nú aftur í rakstrinum, hóast vit hava havt nógvar avbjóðingar av øsku, fíggjarkreppu, minkandi leiguflúgving, og nú eisini útlit til hægri ferðaavgjøld í Keypmannahavn. Vit hava kortini vónir um, at rákið nú er vent, og at grundraksturin fer at roynast væl betur í ár enn í fjør, um vit sleppa undan størri inntrivum, sum vit ikki hava ávirkan á, sigur hann.

Umsetningurin hjá Atlantic Airways annan ársfjórðing í ár var 93 milliónir krónur samanborið við 107 milliónir krónur. sama tíðarskeið í fjør. Eginpeningurin hjá Atlantic Airways var 30. juni í ár 212 milliónir krónur. og solvensurin 50 prosent.

Minsta solvenskravið er 8 prosent. Gjaldførið hjá felagnum er 100 milliónir krónur.

eirikur@sosialurin.fo

## Í MORGIN




Lot til andøvsgul av útnyrðingi, um kvøldið veksur hann vindin upp í ein strúk. Sólglottar, men kanska okkurt ælið. Hitin millum 8 og 11 stig.

## SUNNUDAGIN




Gul til stívt andøvsgul av norði, seinnapartin minni vindur av útnyrðingi. Yvirhøvur turt og sólglottar og hitin millum 7 og 10 stig.

## MÁNADAGIN




Fleyr til gul millum norðan og vestan og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 9 og 12 stig.

**Veðrið týsdagin og mikudagin:**
Lot til andøvsgul mest millum vestan og sunnan og yvirhøvur turt og sólglottar, men mjørkaflókar. Hitin millum 10 og 14 stig.

## LUFTTRÝSTIÐ




**Síðstu nátt:**
Eitt lágtrýst, 1006 hPa. norðan fyri Trondheim fer spakuliga í landsynning. Eitt hátrýst, 1023 hPa. í landsynning úr Hvarvinum fer í landsynning eystan og mennist.




**Komandi nátt:**
Lágtrýstið yvir Norska Havinum fer spakuliga í landsynning. Hátrýstið yvir Eystur-Grønlandi kemur hendavegin og mennist.

## HITALAG




## AVFALL




Miðal: 83 mm

### Hitalagið kring knøttin



**Petur Skeel Jacobsen** greiðir frá um veðrið

| | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Nuuk** | 5 | **Tromsø** | 6 | **Moskva** | 16 | **Athen** | 26 |
| **Reykjavík** | 11 | **Bergen** | 12 | **Berlin** | 25 | **Beijing** | 30 |
| **Tórshavn** | 10 | **Oslo** | 22 | **Paris** | 20 | **New Dehli** | 30 |
| **Lerwick** | 9 | **Stokkhólm** | 20 | **Madrid** | 28 | **Bangkok** | 34 |
| **Aberdeen** | 12 | **Keypmannah.** | 19 | **Róm** | 26 | **Sydney** | 14 |
| **London** | 19 | **Helsinki** | 16 | **Malorca** | 26 | **New York** | 33 |

## VESTFALLSKYRRINDI

24. august Fullmáni
25. august Mánin longst frá jørðini

Kelda. Álmanakkin 2010

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 25. aug. | 07:56 | 20:13 | 06:56 | 19:13 | 07:11 | 19:28 | 09:56 | 22:13 | 10:56 | 23:13 | 06:11 | 18:28 | 05:11 | 17:28 | 08:11 | 20:28 | 09:11 | 21:28 | 07:41 | 19:58 | 08:56 | 21:13 |
| 26. aug. | 08:30 | 20:47 | 07:30 | 19:47 | 07:45 | 20:02 | 10:30 | 22:47 | 11:30 | 23:47 | 06:45 | 19:02 | 05:45 | 18:02 | 08:45 | 21:02 | 09:45 | 22:02 | 08:15 | 20:32 | 09:30 | 21:47 |
| 27. aug. | 09:05 | 21:22 | 08:05 | 20:22 | 08:20 | 20:37 | 11:05 | 23:22 | - | 12:05 | 07:20 | 19:37 | 06:20 | 18:37 | 09:20 | 21:37 | 10:20 | 22:37 | 08:50 | 21:07 | 10:05 | 22:22 |
| 28. aug. | 09:40 | 21:58 | 08:40 | 20:58 | 08:55 | 21:13 | 11:40 | 23:58 | 00:22 | 12:40 | 07:55 | 20:13 | 06:55 | 19:13 | 09:55 | 22:13 | 10:55 | 23:13 | 09:25 | 21:43 | 10:40 | 22:58 |
| 29. aug. | 10:17 | 22:37 | 09:17 | 21:37 | 09:32 | 21:52 | - | 12:17 | 00:58 | 13:17 | 08:32 | 20:52 | 07:32 | 19:52 | 10:32 | 22:52 | 11:32 | 23:52 | 10:02 | 22:22 | 11:17 | 23:37 |